

## Tjóðveldi flokstíng í Skálavík um vikuskiftið

Um vikuskiftið heldur Tjóðveldi flokstíng í Skálavík. Flokstingið er evsta vald floksins og harvið árligi fundurin, har tjóðveldisfólk taka samanum og seta út í kortið av nýggjum samsvarandi hugsjónum floksins. Fríggjakvøldið verður skipanarparturin avgreiddur, har m. a. starvsnevnd skal veljast, og leygardagin byrjar politiska orðaskiftið við formansfrágreiðingini. - Í árinum síðani seinasta flokstíng norðuri við Gjógv, hevur ókyrra verið í politisku skipanini og fíggjar- og búskaparstøðan í heiminum og í Føroyum átti at verið orsøk til gevandi kjak og strategiskar hugsanir um, hvussu vit fóta okkum á øllum mótum, skrivar flokkurin í tíðndaskrivi. Tjóðveldi hevur heitt á fýra fólk, um at leggja fyri í kjakinum á fýra viðkomandi samfelagsøkjum. Jóhanna Olsen, deildarleiðari á Umhvørvisstovuni, Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, Niels Christian Nolsøe, stjóri á Elektron og Petur Pólsson, lærari, yrkjari og tónleikari fara at siga sínar hugsanir um búskap, tilfeingi, umhvørvi og mentan. Samanumtøkan burturúr kjakinum er yvirlýsing floksins um leiðina fram. Leygarkvøldið verður ársveitsla í bygdarhúsinum í Skálavík.

# Sp/f Nakkur tapti Jógvan S málið í Landsrættinum

**Í morgun staðfesti Landsrætturin dómin hjá Føroya Rætti í málinum um línuskipið Jógvan S. Kravið móti Fiskimálaráðnum var upp á stívliga 8 miljónir krónur, men einasta, sum felagið í Klaksvík fekk burtur úr í Landsrættinum, var, at Sp/f Nakkur nú noyðist at gjalda Fiskimálaráðnum sakarmálskostnaðin á 125.000 krónur**

DÓMUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Jógvan Lützen, sum var reiðari á Jógvani S og hansara menn, fóru tómhentir heimaftur úr Landsrættinum. Tað er greitt, nú dómur er feldur í morgun. Eftir stendur, at Sp/f Nakkur noyðist at rinda Fiskimálaráðnum sakarmálskostnaðin á 125.000 krónur*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Dómur er nú fallin í Landsrættinum í málinum um nógv umrødda línuskipið Jógvan S, sum Sp/f Nakkur í Klaksvík átti. Tað var reiðaríið, ið hevði kært dómin, sum fall í Føroya Rætti hin 4. juli í 2006, til Landsrættin. Partarnir í málinum eru Sp/f Nakkur og Fiskimálaráðið.

Dómur í Føroya Rætti hevur áður veitt reiðarínum eitt endurgjald upp á umleið 2,6 miljónir krónur við rentum fyri mist veiðirættindi, tá táverandi fiskimálaráðharrin, Jacob Vestergaard, eftir politiskum trýsti gjørdi av at taka rættindini frá skipinum.

Sp/f Nakkur var ikki nøgt við hendan dómin, sum felagið tískil kærdi til Landsrættin. Kravið hjá felagnum var, at Fiskimálaráðið verður dømt at gjalda stívliga 8 miljónir krónur í endurgjaldi fyri mist rættindi.

Kravið upp á hesar 8 miljónir krónurnar bygdi Sp/f Nakkur á 800.000 krónur um árið fram til ár 2018, tá Fiskimálaráðið sambært lógini um vinnuligan fiskiskap kann inndraga veiðirættindi.

### Eykarokning

Í dóminum, sum fall í morgun, vil Landsrætturin ikki geva reiðarínum í Klaksvík viðhald, men staðfestir hinvegin dómin í Føroya Rætti.

Haraftrat verður Sp/f Nakkur dømt at gjalda sakarmálskostnaðin til Fiskimálaráðið, sum er upp á 125.000 krónur. Hesin peningur skal gjaldast innan 14 dagar eftir, at dómurin er feldur.

Í sínum grundgevingum vísir Landsrætturin til dómin í Føroya Rætti, har sagt verður, at reiðaríið seldi skip og veiðirættindi fyri ein prís, sum var eitt vet hægri enn virðið á skipinum.

Landsrætturin metir, at reiðaríið við søluni av skipi og rættindum hevur fingið dekkað virðið av fiskirættindum og framtíðar fiskiveiðimøguleikum.

- Appellanten har således ikke lidt nogen tab på denne erstatningspost, sigur Landsrætturin í sínum grundgevingum.

Tað var Jógvan Páll Lassen, advokatur, sum umboðaði Sp/f Nakk og Eyðfinnur Jacobsen, advokatur, sum umboðaði Fiskimálaráðið.



Faroe Seafood:

# Keypir ikki Kósavirkið

**- Eg kenni einki til, at vit eru partur av nakrari endurreisn av Kósini í Klaksvík, sigur Meinhard Jacobsen, stjóri í Faroe Seafood**

VINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyrr í vikuni gjørdi Skiftirætturin eftir áheitan frá Christiani Andreassen, advokati, av at leingja gjaldssteðgin, sum felagið, ið eigur fiskavirkið á Kósini í Klaksvík, hevur verið í síðan seint í 2008.

Leingi hevur verið arbeitt við ymiskum loysnum fyri at endurreisa virksemið á hesum stóra og týdningarmikla arbeiðsplássi í Klaksvík, men enn er almenningurin ikki vorðin kunnaður um nakra ítøkiliga endurreisingarætlan.

Ymiskar gitingar hava verið frammi um, hvør møguliga fór at seta pening í – ella fór at keypa – Kósavirkið, og í hesum sambandi hevur Faroe Seafood verið nevnt.

Meinhard Jacobsen, stjóri í Faroe Seafood, vísir kortini aftur, at samráðingar hava verið millum Faroe Seafood og tey, sum standa aftanfyri Kósina í Klaksvík.

- Nei, eg kenni einki til, at okkara felag hevur verið í nøkrum samráðingum um nakað.

Stjórin í Faroe Seafood sigur, at tað einasta, hann veit um Kósina, er tað, sum fjølmiðlarnir hava borið um gjaldssteðgin, sum nú er longdur í tríggjar mánaðir.

- Vit hava nóg mikið at dragast við sjálvir og hava sum er ongar ætlanir um at keypa fiskavirkið á Kósini í Klaksvík, sigur Meinhard Jacobsen.



*- Vit hava nóg mikið at dragast sjálvi og hava ongar ætlanir um at keypa fiskavirkið á Kósini, sigur stjórin í Faroe Seafood, Meinhard Jacobsen*